VÍF-KÍF 32-22 (18-8):

# VÍF hevndi seg

**Ivi var ongan tíð um úrslitið, tá VÍF so dyggiliga hevndi tapið fyri KÍF fyrr í ár, tá grannarnir hittust í Vestmanna leygardagin**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Frá fyrsta bríksli høvdu vestmenningarnir gjørt av mansverja stórskjúttan hjá KÍF, og uttan mongu málini frá Damir Oros var lítið, sum kollfirðingarnir fingu gjørt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eitt av liðunum, sum í ár hevur bast VÍF eru kollfirðingar, og tí var einki at ivast í, at spenningurin var stórur undan seinna dystinum millum liðini bæði. At talan hartil er um grannabygdir, sum fram til seinasta kappingarár høvdu sama heimavøll mundi ikki gera spenningin minni í so máta, og tað var eisini heilt fitt av fólki komið í VÍF høllina sunnudagin.

Var tað spenningurin, sum hesi komu fyri at uppliva, so var tað tó skjótt greitt, at tey skuldu gerast vónbrotin. Til tess var munurin millum liðini snøgt sagt alt ov stórur. Kanska var munurin ikki so øgiliga stórur fyrstu løtuna, men tá VÍF fyrst hevði fingið ferð á, so var snøgt sagt einki at gera.

Eitt av vápnunum hjá vestmenningum – og ivaleyst eisini tað týdningarmesta – var, at teir frá fyrsta bríksli høvdu gjørt av at mansverja Damir Oros. Eitt heldur óvanligt stig VÍF at taka, men hinvegin vóru minnini frá fyrra dystinum millum liðini framvegis klár, og tí var hetta helst eisini ein skilagóð avgerð.

Hetta lætti kanska eisini um uppgávuna hjá Eli Müller í málinum, men tað skal ikki takast frá honum, at hann enn einaferð stóð ein branddyst. Hóast hann er nakað lágur av vøkstri til at vera hondbóltsmálverji, so eru evnini at lesa spælið framúr, og einki er at ivast í, at talan her er um ein av allar bestu málverjum okkara.

Ein slíkan eiga kollfirðingar eisini í Óla Krisitan Djurhuus, men hesa ferð var ikki so nógv, sum hann kundi gera. VÍF-álopini koyrdu snøgt sagt alt ov væl, og tó at hann fleiri ferðir tók royndir frá leysum leikarum, so munaði tað lítið í samlaða roknskapinum.

Var talan ikki um tann heilt stóra spenningin, so var dramatikkurin tó stórur. Ikki minst móti dystarenda.

Undirtónin var kanska, at Regin Petersen í fyrra dystinum meiddi seg illa í samanstoyti við Piti Negru, og hetta vildu kollfirðingarnir helst líka sum hava upp á pláss. Eftir fleiri at kalla ófantaligar nærdystir, har onkur einstakur endaði við útvísing, fingu kollfirðingarnir at enda somikið ilt í rumenska leiakaran, at hesin í illsiinni royndi at sletta mótstøðuleikara av sær, og tað gav so reyða kortið, sum kollfirðingar fegnir vildu hava fram.

Eina løtu afturar tóktust leikararnir hava hug at dystast dekan ov nógv persónligt, heldur enn at hugsa um dystin, men meira enn tað sama hendi so ikki. Og sum so kundi tað eisini vera tað sama. Vestmenningar ognaðu sær tvey trygg stig til væl fyltu kontina, og enn eru teir heilt væl við í oddastríðnum, har teir eisini halda seg hoyra heima.

Kollfirðingar máttu bara ásanna, at hesa ferð vóru teir ikki nóg stinnir, og skal hugsingur vera um at gera um seg longur frammi í oddinum, so mugu teir helst til at hugsa um, hvussu leikast skal, tá Oros verður tikin úr spælinum. Tað megnaðu teir so ikki hesaferð.

### Dysturin í tølum

**VÍF-KÍF 32-22 (18-8)**
Málskjúttar:
VÍF: Ingi Olsen 7(5), John Zachariasen 6, Agnar Joensen 5, Piti Negru 5, Ólavur Brimnes 3, Áki Olsen 2, Daniel Rápa 2, Eli Müller 1, Áki G. Olsen 1
KÍF: Damir Oros 6(3), Mirko Milinkvic 4, Rógvi Weihe 4, Eddi H. Joensen 3, Petur Martin Poulsen 2, Kristjan Madsen 2, Hallur Hansen 1
Brotskøst: VÍF 6, KÍF 4
Útvísingar: VÍF 3, KÍF 3
Diskvalifikatión: VÍF 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen. Kundu væl lagt eina harðari linju, og harvið sloppið undan ógvusliga og rótuta spælinum seinasta góða korterið.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 9 | 8 - 0 - 1 | 225 | 181 | 44 | 16 |
| 2 | VÍF | 10 | 6 - 0 - 4 | 228 | 186 | 42 | 12 |
| 3 | StÍF | 10 | 5 - 1 - 4 | 237 | 243 | -6 | 11 |
| 4 | Stjørnan | 9 | 4 - 1 - 4 | 191 | 198 | -7 | 9 |
| 5 | Kyndil | 9 | 4 - 0 - 5 | 215 | 215 | 0 | 8 |
| 6 | Neistin | 10 | 3 - 2 - 5 | 192 | 210 | -18 | 8 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 1 - 0 - 8 | 176 | 231 | -55 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 11 | 8 - 0 - 3 | 317 | 277 | 40 | 16 |
| 2 | VÍF | 11 | 7 - 1 - 3 | 345 | 279 | 66 | 15 |
| 3 | Neistin | 10 | 7 - 0 - 3 | 282 | 266 | 16 | 14 |
| 4 | Kyndil | 10 | 5 - 2 - 3 | 274 | 263 | 11 | 12 |
| 5 | KÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 255 | 265 | -10 | 7 |
| 6 | H71 | 10 | 2 - 0 - 8 | 235 | 290 | -55 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 2 - 0 - 8 | 242 | 310 | -68 | 4 |

H71-Kyndil 25-28 (14-14):

# Kyndil komið á rull aftur

**Eftir fleiri lak úrslit, tykist ferð vera komin á aftur Kyndil, og leygardagin vunnu teir grannauppgerðina móti H71**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinastu vikurnar hevur verið langt ímillum glottarnar hjá Kyndli. Mansliðið, sum eitt skifti var heilt frammi í oddinum á stigatalvuni hevur staðið seg illa síðani greiða tapið í Vestmanna fyri góðum mánaði síðani. Ein glotti var kanska at hóma, tá tað gjørdist til javnleik móti VÍF seinatsa vikuskifti, og nú tykist Kyndil hava fingið ferð á aftur.

### Rokut og javnt

Leygardagin leiktu teir grannauppgerð móti H71, hóast talan heldur ikki hesa ferð gjørdist um ta stóru leikligu upplivingina í einum grannadysti, so eydnaðist Kyndli at toga ein tepran sigur heim.

Fyri tað nógva, so var tó líkt til, at hoyvíkingarnir skuldu gera meira enn bara at arga mótstøðumenninar, og tað var ikki fyrr enn í seinastu minuttunum, at munur veruliga kom ímillum liðini.

Fram til tá hevði fyrst og fremst Halgir Dahl Olesen hildið hoyvíkingunum inni í dystinum við sínum mongu málum, men í seinasta enda mátti eisini hann boyggja seg. Eini grannauppgerð so líkt, so gjørdist talan í løtum um rættiliga harðligt spæl, og serliga vóru tað hoyvíkingarnir, sum høvdu hug at ilskast. Seinastu løtuna vóru teir enntá bert tríggir útileikarar á vøllinum, men hetta sigur helst meira um, hvussu nógva orku teir høvdu lagt í dystin fram til tá. Orka, sum í seinasta enda var nyttuleys, tí stig fingu teir so eingi afturfyri.

Við sigrinum syrgdi Kyndil fyri, at teir framvegis hava møguleikan at krøkja seg í oddin áðrenn farið verður í holt við endaspælið, men hetta krevur so, at stig fáast burtur úr teimum báðum seinastu dystunum, sum eru ímóti ávíkaviust Neistanum og StÍF.

### Dysturin í tølum

**H71-Kyndil 25-28 (14-14)**
Málskjúttar:
H71: Halgir Dahl Olsen 13, Niels Viggo Niclasen 5, Tróndur Vatnhamar 3(1), Bárður Brimvík 1, Jákup á Borg 1, Johnny Durhuus 1, Høgni M. Joensen
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 9(4), Jacob Jónsson 8(1), Jónleif Sólsker 4, Høgni Klein 3, Heini Bendtsen 2, Janus Einar Sørensen 1, Regin Johannesen 1
Brotskøst: H71 2, Kyndil 5
Útvísingar: H71 11, Kyndil 3
Diskvalifikatiónir: H71 2 (báðar 3X2 minuttir)
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen.



VÍF-Stjørnan 26-12 (15-4):

# Svartur dagur hjá Stjørnuni

**Stjørnan mundi fremja vánaligasta avrikið á árinum, tá tær vitjaðu í Vestmanna, og úrslitið gjørdist eisini hareftir**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tølini tala fyri seg. Stjørnan fekk nevnliga av at vita, tá tær leygardagin vitjaðu í Vestmanna. Hetta var samstundis eisini dysturin millum tey bæði liðini, sum seinastu trý árini hava kunnað rópt seg føroyameistarar, men hesa ferð var tað so bara annað liðið, sum sýnda nakað, ið minti um meistaraspæl.

Kanska var Stjørnan skert, nú Daniela Ercevic ikki fekk verið við, men tað kann ikki vera rætt, at ein einstakur leikari skal hava so stóran týdning fyri liðið.

Hvussu var og ikki, so er einki at ivast í, at fyrri hálvleikurin av dystinum leygardagin man fara at standa í minninum hjá Stjørnuni sum ein hin svartasta løtan í hondbóltslívi teirra.

Fyrstu løtuna gekk javnt á, og millum annað skuldu sjey minuttir ganga, áðrenn nakað mál kom, men tá tað so fyrst kom hol á, so gekk bara ein vegin. VÍF skoraði, skoraði og skoraði, meðan einki bar til hjá Stjørnuni. Fyrstu nøsku royndirnar tók Manuela Stan sær í vanliga tryggum stíli, og tað var nóg mikið til at taka pippið frá Stjørnuni. Tær mistu mest sum hugin at royna seg við skotum, og samstundis mistu tær í einum drúgvum tíðarskeiði mest sum hvønn bólt, sum tær høvdu hendur á.

Og hetta varð revsað náðisleyst av VÍF. Uttan stórvegis hóvasták kundu tær ferð eftir ferð fara í ómaksleys kontraálop, og heldur ikki tá Stjørnan hevði verjuna upp á pláss, tóktist hetta at bila nakað.

Tað skuldu ganga 20 minuttir, áðrenn Stjørnan fyri fyrstu ferð fekk bóltin í málið, men tá mundi allar seinasta neistin fyri langt síðani verið farið úr leikarunum. Tað, sum tað snøgt sagt ráddi um, var nú at avmarkað tapið, soleiðis at skommin ikki gjørdist fullkomin.

Partvíst eydnaðist hetta eisini, men ilt er at ímynda sær, hvat vildi hent, um VÍF alla tíðina hevði spælt við sterkastu manningini. Tað gjørdu tær so ikki, men valdu heldur at lata fleiri av ungu leikarunum fáa nakað av spælitíð, og tó at hetta tók nakað av leikferðini, so sýndu fleiri teirra, at tær so avgjørt eru framtíðar evni til besta liðið.

VÍF helt við sigrinum fast í frástøðuni til oddaliðið úr Vági, og tó at tað ivaleyst er avgjørt, at VB verður fremsta liðið í grundspælnum, so kann VÍF við sigri í írestandi heimadystinum móti VB skapa veruligan spenning í, áðrenn farið verður í holt við endaspælið.

Hjá Stjørnuni man lítið annað vera at gera, enn at gloyma leygardagin. Gaman í fáa tær ikki vanliga leikandi venjaran aftur her og nú, men onkursvegna má liðið gera sær greitt, at tær eisini kunnu standa seg so nøkun lunda uttan hesa, og í øllum førum má høvdið framyvir haldast nakað væl hægri, um tær skulu hava nakran sum helst møguleika at standa seg í kappingini um fremru sessirnar.



*Serstakliga í fyrra hálvleiki gekst illa í hond hjá Stjørnuni, og eitt skifti var tað rár hending, at tær yvirhøvur somikið sum dittaðu sær at skjóta*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**VÍF-Stjørnan 26-12 (15-4):**
Málskjúttar: VÍF: Nicoleta Radu 8, Sóley Mikkelsen 7(3), Jacklin Durhuus 6, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Fríða Marjunardóttir 1, Alis Høghamar 1
Stjørnan: Bára S. Klakstein 5(2), Una Olsen 5, Davina Sundskarð 1, Jastrid Gullaksen 1
Brotskøst: VÍF 5, Stjørnan 4
Útvísingar: VÍF 1, Stjørnan 3
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen. Høvdu ikki stórt annað at gera enn at skriva málini hjá VÍF upp.

VB-Kyndil 28-18 (13-8):

# VB vinnur grundspælið

**Hóast tær enn hava tríggjar dystir eftir at leika, so hevur VB longu tryggja sær, at einki lið fær fleiri stig enn tær í grundspælinum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hesum syrgdu vágbingarnir fyri, tá tær annan dagin á rað dystaðust ímóti Kyndli.

Fyrri dysturin millum liðini endaði sum kunnugt við einum tryggum heimasigri, og fyrstu løtuna sunnudagin nýtti VB tyil at staðfesta, at Kyndil skuldi ikki vænta sær nakað sum helst burtur úr drúgva hondbóltsvikuskiftinum.

Eftir nakrar heldur tamar fyrstu minuttir, setti VB snøgt sagt turboløðaran til, og so var ikki so nógv, sum Kyndil kundi gera, til tess at steðga VB. Í teimum trimum útlendsku leikarunum hevur liðið kanska nakrar av bestu leikarunum í føroysku kappinginil, men umframt hesar tykist sjálvsálitið hjá heimligu leikarunum at vaksa fyri hvønn dyst, sum gongur, og tað gav eisini at bíta hesaferð.

### Sleptu bert eina løtu

Tað var tó um reppið, at tað eydnaðist Kyndli at koma aftur í dystin. Eftir ógvusligu byrjanina hildu tær á heimaliðnum helst, at nú var sigurin longu tryggjaður, og so gekk tað, sum tað so ofta ger. Munurin á einum hondbóltsvølli er sjáldan størri enn so, at liðini alla tíðina mugu geva seg fult út, og eina løtu tóktist hesin veruleikin at skula kosta VB dýrt.

Við fimm málum á rað togaði Kyndil seg aftur í dystin, men so gekk heldur ikki meira. Hóast møguleikarnir vóru til staðar, so spurdist einki burturúr, og hetta mundi taka seinastu trúnna frá gestunum. Eisini hóast hálvur tími enn var eftir at leika.

Og í seinna hálvleiki kundi VB so av álvara fara undir at staðfesta sigurin. Snøgt sagt, so megnaði Kyndil ikki at skapa neyðuga spenningin í aftur. Stútt og støðugt økti heimaliðið um leiðsluna, soleiðis at tær at enda vunnu ein tryggan sigur.



*Við sannførandi sigrinum á Kyndli staðfesti VB oddastøðuna, og ilt er nú at ímynda sær, at tær ikki skulu enda á ovasta sessinum í grundspælinum*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Vinna grundspælið

Sum sagt, so inniber sigurin, at VB í øllum førum hevur tryggjað sær, at einki lið fær fleiri stig enn tær í grundspælinum. Nú tær hava leikt níggju dystir, hava tær 16 stig, og hetta er sama stigatal, sum VÍF kann røkka.

Enn hevur liðið tríggjar dystir eftir, men hesir eru allir á útivølli, og tí er langt ífrá víst, at talan verður um fulla úrtøku. Ikki minst kann dysturin í Vestmanna gerast tungur, men tað er tó ilt at ímynda sær, at VB einki skal fáa burtur úr hesum trimum útferðunum.

Kyndil hevur hinvegin enn til góðar at staðfesta seg sum eitt av teimum liðunum, sum roknast skal við í oddinum. Avrikini hjá liðnum hava langt ífrá verið merkt av tí støðufesti, sum skal til, um talan skal gerast um topplásering, men eitt nú hava sigrarnir á VÍF víst, at liðið so avgjørt ikki er heilt uttan evni. Hesi evni skulu tó prógvast hvørja ferð, um liðið skal gera sær vón um heiðursmerki.

### Dysturin í tølum

**VB-Kyndil 28-18 (13-8)**
Málskjúttar:
VB: Daiva Toumaite 10(1), Reda Kurkaskiene 5(1), Guðrið Mortensen 3, Arnleyg Hjelm 3, Eyðbritt Krosslá 2, Anja Magnussen 2, Laila Jespersen 2, Eyðdis Kjærbo 1
Kyndil: Lotte Sørensen 6(3), Annika Ljósstein 4, Ann Mari Vang 3, Annika Thomsen 2, Iliana Manolescu 2, Marjun Tróndarson 1
Brotskøst: VB 3 ,Kyndil 6
Útvísingar: VB 3, Kyndil 3
Dómarar úr TB: Kári Niclasen & Birgir Dimon.